# tavgerandi!



*Kappróðurin á Norðoyastevnu 2009*
Mynd: Savnsmynd

fyrrenn leygardagin. Eitt nú at leggja startin út. Vit plaga eitt nú at leggja fasta startin á 1500 metrar málið út fríggjakvøld, tí av at barnaróðurin er blivin til ein FM róður, so skal hann brúkast á 500 metra málinum fyrst.

Fyrireikararnir í Klaksvík hava áður roynt at fyrireika kappróður.

Vit eru tveir, ið hava evstu ábyrgd og vit hava fingist við at fyrireika kappróður á norðoyastevnu í trý ár nú. Vit eru heldur ikki bangnir fyri at biðja um hjálp, um á stendur. Hóast kappróðurin á norðoyastevnu kann draga út, so eru menn fúsir at hjálpa til, sigur John Reid.

Men hvat vænta klaksvíkingar sær av kappróðrinum?

Eg vóni sjálvandi, at tað gongur bátunum her norði væl, men nú kenni eg ikki hinar bátarnar so væl sum eg kundi ynskt, sigur John Reid at enda.

Kappróðurin á norðoyastevnu byrjar klokkan 13 við barnaróðri og klokkan 15 byrjar ársins fyrsti FM róður hjá teimum vaksnu.

*trondur@sosialurin.fo*

## TSF skipar fyri MTB kapping leygardagin

**SÚKKLING Leygardagin verður fjallasúkklukapping í Havn. Hetta er triða av fimm kappingum í H&G Cup 2010**

Tíðindaskriv

Leygardagin kl. 11 verður fjallasúkklukapping í Havn. Hesa ferð verður kappast á gøtunum kring Stutendaskúlan í Hoydølum. Kappingin er fyri menn, kvinnur og unglingar.

Talan er um eina Cup kapping og hjá monnum er tað Gunnar Dahl-Olsen, ið liggur á odda við fullum stigatali, nevniliga 14 stigum.

Okkara fremsti súkklari, Torkil Veyhe, hevur nú eisini avgjørt at royna seg innan hesa súkklugrein. Hann lá leingi á odda seinast kappast bleiv, men vegna eitt tekniskt brek við súkkluni mátti hann taka til takkar við einum 2. plássi!

### Teinurin leygardagin

Startur/mál er við fimleikahøllina, og koyrt verður runt inni í plantaguni, oman á keiðina (niðri í gomlu hoyvíkini), út á Boðanes at venda, niðan til tyrlupallin, og oman aftur og yvir til start/mál.

Tey, ið ynskja at luttaka skulu møta við Fimleikahøllina við Studentaskúlan kl. 10.00.

## A-landsliðið kann arga teir ungu



*Venjingardystur við Margáir*
Mynd: Álvur Haraldsen

**U21-LANDSLIÐIÐ Tá U21-landsliðið í summar tekur ímóti Andorra, skal A-landsliðið samstundis spæla í Estlandi. Hóast tað er gleðiligt, so kann tað fara at ávirka avrikini hjá U21-landsliðnum, at heili átta U21-landsliðsleikarar eru við í A-landsliðshópinum, ið skal spæla í kvøld**

Tróndur Arge

Um vit til dystin ímóti Andorra í august mangla einar fimm til sjey spælarar, so fer tað sjálvandi at ávirka liðið hjá okkum. A-landsliðið skal sjálvsagt raðfestast fyrst, men hetta var óheppið fyri okkum, sigur Bill McLeod Jacobsen, sum er annar av venjarunum hjá U21-landsliðnum.

U21-landsliðið hevur í vikuni spælt tveir innanhýsis venjingardystir. Á Toftum mikukvøldið og við Margáir hóskvøldið.

Vit eru væl nøgdir við teir báðar dystirnar. Vit hava eisini fingið høvi at síggja fleiri nýggjar leikarar. Fleiri leikarar eru eisini farin úttanlands og hava gjørt stór framstig. Uppaftur aðrir eru komnir aftur til Føroyar og hava fingið fótin fyri seg í føroysku kappingini.

Alt í alt er U21 hópurin sterkari enn nakrantíð, sigur Bill um venjingardystirnar.

Føroyar eru í bólki við Russlandi, Rumenia, Lettlandi, Moldova og Andorra. Føroyar liggja á einum fjórða plássi við átta stigum. Andorra hevur eitt stig á niðasta plássi.

Vit hava nú sæð einar 40 leikarar og í summar verða einir tveir venjingardystir. Tað er eisini uppá tal, at hópurin fer á eina venjingarlegu stutt undan ólavsøku, men tað er ikki komið upp á pláss enn, sigur Bill at enda um fyrireikingarnar til komandi uppgávurnar.

U21-landsliðið hevur tveir dystir eftir í hesari EM undankappingini. 8. august kemur Andorra á vitjan í Føroyum og 4. september tekur Moldova ímóti.

*trondur@sosialurin.fo*